

Hann riggar til til stóru messuna í Klaksvík. Mynd oljan.fo

# Atlantic Fair av bakkastokki í Klaksvík í morgin

**Jan Müller**

11.05.2015 - 23:20

Oljan.fo

Ikki færri enn 171 fyritøkur úr 18 londum vera við, tá stóra maritima stevnu- og messutiltakið Atlantic Fair fer av bakkastokki í morgin. Messan letur upp kl. 10 og er opin til kl. 17 bæði týsdag og mikudag og hósdagin til kl. 16. Umframt mongu básarnar verða eisini fleiri fyrilestrar. Tað verður borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan Skorheim, sum bjóðar vælkomin, og løgmaður Kaj Leo Johannessen fer at seta messuna kl. 10.30. Johan Dahl, vinnumálaráðharri verður tann fyrsti sum fer at hugleiða í fyrilestrarsalinum, týsdagin kl 13.







OLJAN
OLJAN

